**EG MEINI TAÐ**

# Hattin av fyri Annlis ...



*Bergur Rasmussen skrivar:*

Í hesum døgum sita tey á einum almennum stovni og leggja seinastu hond á eini 15.000 girokort, sum verða send út til tilsvarandi tal av serliga útvaldum føroyingum. Kortið er ein rokning. Upphæddin er 2000 krónur. Gjaldsfreistin er einaferð seinni út á árið.

Og fyri at tað ikki skal vera lygn, so vera skjótt onnur 15.000 líknandi girokort klár at senda út til somu útvaldu føroyingar út á summarið. Tað kortið er eisini ein rokning. Tó er tann upphæddin einans 1500 krónur.

Altso tilsamans fáa hesir 15.000 útvaldu føroyingarnir ein eykaskatt uppá 3500 krónur, tí tað má tað jú roknast sum, tá ið tað eru tveir almennir stovnar, ið senda fólki rokningar.

Talan er sjálvandi um verandi út- og sjónvarpsgjald.

Eyguni í Annlis Bjarkhamar glógvaðu, tá ið hon í degi og viku spent greiddi frá, at Mentamálaráðið arbeiddi við einum uppskoti, ið fór at seta gjaldið niður hjá øllum inngjaldarum. — Hon skuldi bara leggja uppskotið fyri á einum samgongufundi fyrst, so varð lógin løgd fyri tingið.

Men nei, samgongufundurin feldi uppskotið. — Fólkafloksmenn vóru harðliga ímóti. — Hatta er ein eykaskattur, og tað vilja vit ikki vera við til, segði sjálvur løgmaður, so har var einki at gera hjá unga mentamálaráðharranum, ið so nakkalong noyddist niðan aftur á Hoyvíksvegin við vrakaða uppskotinum.

Høvuðsinnihaldið í uppskotinum var, at rokningarnar ikki vóru sendar út til tey føroysku húskini, men til hvønn einstakan brúkara ístaðin. — Vit eru jú øll brúkarar av almennu loftsmiðlunum, ið jú eru teir einastu, sum veita okkum tænastur. — Kann væl vera, at DR ella BBC eru betri rásir, men nær sendu tær seinast á føroyskum?

Sum er lata umleið 15.000 húski 3500 krónur í part til hesar miðlar, og tað gevur eina árliga inntøku uppá 52,5 milliónir. Um vit ístaðin hugsaðu okkum, at hvør einasti føroyingur yvir 18 ár skuldi betalt sín part av hesi upphædd, so hevði hvør latið minni enn helvtina. Og tað er lætt at rokna út, tí tølini ganga út móti hvørjum øðrum. Vit siga, at stovnarnir báðir skulu hava 52.5 milliónir, og tá ið tað eru umleið 35.000 fólk yvir 18 ár á hesum oyggjum, so minkar út- og sjónvarpsgjaldið niður í 1500 krónur fyri hvønn inngjaldara.

Og álvaratos, eg dugi ikki at síggja, hvar eykaskatturin, fólkafloksmenn siga seg síggja er, í hesum hjá teimum støku uppihaldarunum, hjá teimum lesandi, hjá barnafamiljuni ella hjá pensjónistunum. — Men hinvegin, eg havi ongantíð bjóðað meg fram sum bókhaldari ella grannskoðari nakrastaðni.

So hattin av fyri tær Annlis Bjarkhamar, at tú tordi at hugsa stórt og solidariskt um loftmiðlarnar. Bert spell, at uppskotið fekk so kaldliga móttøku í samgonguni, at tú noyddist at hækka gjaldið hjá teimum 15.000 serliga útvaldu, fyri at allir føoryingar aftur í ár skulu sleppa at síggja sína elskaðu Ólavsøkuskrúðgongu.

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

# Sjónvarpsfelagið vil hava sendiloyvi

Í januar 1978 varð mett, at eini 600 sjónvarpstól vóru í Føroyum. Hóast felagið seinastu 10 árini hevði stríðst við landsstýrið um at sleppa at royndarsenda, so var framvegis einki sjónvarp sent í Føroyum

**FYRI 25 ÁRUM SÍÐANI**
*Eirikur Lindenskov*



*Karter Højgaard var formaður í Sjónvarpsfelagnum í 1978. Myndin er frá einum panelfundi um sjónvarpsspurningin, sum Ungmannafelagið Skansastova skipaði fyri í november í 1976*

Í Sosialinum tann 11. januar í 1978 verður skrivað um Sjónvarpsfelagið, sum varð stovnsett tíggju ár frammanundan. Endamálið við felagnum var at útvega loyvi til royndarsjónvarp, at leggja fasta ætlan fyri royndarsjónvarpi, bæði fíggjarliga, tekniskt og fyri sendingum og at fáa í lag føroyskt sjónvarp, sum kann røkka alt landið. Felagið hevði fleiri ferðir heitt á landsstýrið um at fáa sendiloyvi, men einki svar er komið. Í januar hetta árið skipað felagið so fyri einum almennum fundi, har sjónvarpsspurningurin var til viðgerðar.

Fundurin varð hildin í samkomuhøllini á Landssjúkrahúsinum hóskvøldið 16. januar í 1978. Formaður í Sjónvarpsfelagnum var Karter Højgaard, umsjónarmaður á Landssjúkrahúsinum. Hann sigur við Sosialin, at teir rokna við, at fleiri fólk fara at gera seg til lim í felagnum, nú fundur verður hildin um spurningin.

– Í dag hevur felagið 80 limir, sigur Karter Højgaard sum heldur, at tað munnu vera eini 600 sjónvarpstól í landinum.

Sjónvarpsfelagið varð stovnað í 1967, og hevði tað samráðingar við landsstýrið hetta sama árið um at fara undir royndarsendingar. Men har kom einki burturúr.

Í 1975 heitti felagið á landsstýrið um at geva felagnum – fyri fyrst í eina avmarkaða tíð – loyvi til at skipa fyri royndarsjónvarpssendingum í Tórsavn, undir treytum, sum verða settar av landsstýrinum.

### Tekniskt gjørligt

Felagið segði í brævinum til Landsstýrið m. a.:

– Tann tekniski framburðurin á hesum øki hevur tey seinastu árini verið ógvuliga stórur. Um landsstýrið játtar felagnum loyvi til at fara undir royndarsendingar, er einki til hindurs fyri at byrja beinanvegin við sendingum í litum og svart/hvítum, men roknast má við at tilrættarlegging av regluligum sendingum, herundir útvegan av tilfari v. m. kemur at taka nakað av tíð.

Karter Højgaard sigur, at teir enn einki hava frætt frá landsstýrinum. Tað er eisini ein av orsøkunum til, at felagið nú vil hava gongd í málið.

Formaðurin í Sjónvarpsfelagum sigur víðari við Sosialin, at tað er ilt at siga nakað við vissu um, hvat eitt sjónvarp skal innihalda.

– Tað verður sjálvandi alt, sum fólk hevur áhuga fyri, men leggur hann afturat, fyrsta stigið verður helst at seta eina nevnd, sum skal taka sær av hesum spurninginum.

Í nevndini í Sjónvarpsfelagnum sótu um hetta mundið:
Karter Højgaard, formaður
Djóni Ziska
Hjalti Skaalum
Óli Thorup
Niels Juel Nilsen.

# Sjónvarpið á landsstýrisborð

Í Sosialinum tann 11. januar í 1978 var sjónvarpsmálið á skránni

**FYRI 25 ÁRUM SÍÐANI**



*Dánjal Pauli Danilsen var landsstýrismaður, m.a . í mentamálum, árini 1975-81. Hann helt, at vit áttu at fingið føroyskt sjónvarp, tí »har er so nógv positivt at heinta«, sum hann málbar seg*

Sosialurin skrivar hendan dagin á forsíðuni, at Dánjal Pauli Danilsen, landsstýrismaður sigur, at hann fer at leggja sjónvarpsmálið fyri landsstýrið í hesi tingsetuni.

»Sostatt skal landsstýrið áðrenn tingið fer heim í vár, taka støðu til, um málið skal á tingborð.

Prinsippavgerðin um at seta á stovn føroyskt sjónvarp varð tikin fyri tveimum árum síðani. Dánjal Pauli Danilesen legði uppskotið, sum fekk 23 atkvøður, fram. Síðani hava kanningar og útrokningar verið gjørdar, og nú er málið klárt at leggja fram, sigur landsstýrismaðurin í mentamálum.

Spurdur hví landsstýrið ikki hevur svarað brævinum viðvíkjandi loyvi til royndarsjónvarp, sum Sjónvarpsfelagið sendi tí í 1975, sigur Dánjal Pauli Danilsen, at hetta kemst av, at landsstýrið ikki enn hevur tikið støðu í sjónvarpsmálinum.

### Sleppa ikki undan sjónvarpi

Sjálvur er Dánjal Pauli Danielsen fyri sjónvarpi í Føroyum.

– Tað er nogv positivt at heinta í sjónvaropi, og vit kunnu ikki læsa okkum úti frá tí, sigur hann. Tað kemur í øllum føri í einum ella øðrum líki.

Hann nevndi í hesum sambandi norðurlendska sjónvarpsknøttin, sum ætlanir eru um at senda upp.

Norðurlondini skulu hava fund um henda knøttin komandi mánadag. Føroyar verða ikki umboðaðar á hesum fundi, hóast landsstýrinum stendur tað í boði.

– Tað er eisini ein spurningur í sambandi við stovnsetanina av einum føroyskum sjónvarpi, um ikki skal byrjast í smáum, tí so nógv onnur almenn arbeiði júst nú eru í gerð ella fara í gerð, endar Dánjal Pauli Danilsen, landsstýrismaður.«



# Í klæðum kongs

At føroyingar eru í danska herinum ella í lívgardanum hjá drotningini, er ikki so óvanligt. Men at tveir brøður velja hesa leið, er ikki gerandiskostur, men brøðurnir Rene og Djóni Eidesgaard úr Vági hava báðir roynt seg í kongsins klæðum



*Rene og Djóni Eidesgaard, tveir brøður, ið hava roynt seg í klæðum kongs, kongens klæ'r*

**SOLDÁTAR**
*Dagfinn Olsen*

Verður brúdleyp í danska kongshúsinum í næstum, sum fleiri helst eru ivaleys í, so er ein føroyingur millum kongaligu tónleikararnar til stórhendingina.

Djóni Eidesgaard er nevniliga tónleikari í kongaliga lívgardanum.

Søgan er tann, at eldri bróður Djóna, Rene Eidesgaard, í 1997 gjørdi av at fara í danska hertænastu og so í lívgardan. Tað eru teir við stóru og lodnu húgvunum. Nú er Djóni eisini farin sama veg, men hevur tó valt at fara tónleikavegin og hann leikar nú trummu, tá gardin dagliga hevur sína gongd við Gothersgade og við Amalienborg ella Fredensborg, alt eftir hvar tey kongaligu nú halda til.

### Dreingjadreymur

Rene greiðir frá, at tá hann í 1997 valdi danska herin, so var talan um ein dreingjadreym. Hann var skúlatroyttur og vildi royna okkurt øðrvísi og spennandi.

Rene var í hernaðartænastu frá juni í 1997 til maj 1998. Fyrst er ein vanligur soldátur, men so kann ein t.d. velja at fara í lívgardan hjá drotningini.

- Tað var strævið og vit vóru undir trýsti frá byrjanini, sigur Rene.

Nógv byrja sjálvboðin, eini 1000 mans árliga. Nú Djóni byrjaði í heyst, vóru eini 850, ið byrjaðu.

Djóni vitjaði heima um jólini, nøkur kilo léttari, enn tá hann fór avstað fyri nøkrum mánaðum síðani. Hann visti frá Rene, hvat tað snúði seg um, og hevði eisini hug at royna hernaðarlívið. Eftir at hava verið neyðugu hernaðartænastuna, kann ein velja, t.d. at fara undir útbúgving, og hesin møguleikin stendur frammaliga hjá Djóna.

Eins og bróðurin valdi hann lívgardan, men fór eitt fet víðari og royndi seg sum trummuleikara og varð góðtikin. Nú er hann kongaligur tónleikari og ber og leikar á eina 4 og eitt hálvt kilo tunga trummu, ið kostar 10.000 krónur.

Tá ein velur júst hesa leiðina, so sleppur ein undan at fara aftur at "spæla soldátur", sum ein annars skal. Djóni býr á kassernuni við Rosenborg, tí har er drotningin júst nú, og tá hon er har, so er parada hvønn dag.

Annars er lívið sum gardi ella tónleikari merkt av ávísum tíðum og hvat tey kongaligu havast at og hvar tey eru.

- Fyri tíðina er kongavakt og ein túrur er hvønn dag klokkan 10.00, sigur Djóni, sum tó má upp við morginum at venja nýggj løg.

Og verður so kongaligt brúdleyp í næstum, sum útlit eru til, so verður ein føroyingur millum kongaligu tónleikararnar.

### Royna at fáa teir at flenna

Sum tónleikari eru ferðir ein partur av lívinum og fyrst er ein túrur til Edinburgh til Tatoo á skránni. Nógvir føroyingar kenna hesa árligu hending, ið vanliga verður víst í sjónvarpi.

Rene valdi í síni tíð ikki ávísa leið innan gardan, men stóð vakt, sum ein av eyðkendu vaktarmonnunum í stóru lodnu húgvunum. Og hesar kenna øll og mong hava helst roynt at fáa onkran teirra at flenna ella at smílast, hóast teir eiga at láta sum einki.

- Serliga eru tað svenskarar, ið royna hetta, sigur Rene, og minnir á, at teir ofta komu júst hesa leiðina á síni ferð í Keypmannahvn, men eisini danir royna seg.

- Og so er tað jú kenda søgan um japanarar við sínum myndatólum, smálær Rene.

Báðir eru teir samdir um, at hernaðarlívið kann vera strævið og einstáttað. Dagarnir kunnu vera skemalagdir einar 14 dagar fram.

- Vakt er alt samdøgrið og vaktarskiftið er býtt í 3. Tað er stuttligt at standa vakt í byrjanini, men í 4 mánaðar, tað er long tíð. Serliga á nátt, ein sær kanska bert ein einsamallan taxabil, sigur Rene.

### Guðstænasta á jeepi

Rene og Djóni eru ájavnt í tænastu, tó at Djóni hevur valt aðra leið. Fyrsta tíðin er soldátalív og báðir hava eisini vunnið sær Rex tekinini, sum fáast eftir grótharða Rex-túrin, har fleiri falla frá.

- Eg minnist, at einaferð høvdu vit guðstænastu, ið var sera improviserað, altar var motorhjálmurin á einum Jeepi, minnist Rene og báðir minnast aftur á svangligar løtur og minni hugaligar løtur.

- Tað er ein túrur uppá eini 80 kilometrar og ein verður trýstur í botn, matarlepin var nakað soleiðis, eitt síl, tvey epli, ein leykur og eina gularót. Yvirmenn kundu finna uppá at minna okkum á allar teir avlopspartar av pizza, sum vit millum ár og dag høvdu blakað burtur. Jú, eitt vikuskifti í helheimi, eru Rene og Djóni samdir um, tó teir fegnir vísa á Rex tekin síni.

Ein broyting, sum hend er, síðani Rene var í tænastu sum lívgardi er, at í dag sleppa eisini konufólk at royna seg og 8 eru í løtuni.

Júst hví ein velur at royna herin eru orsøkirnar helst ymsar til, halda Rene og Djóni Eidesgaard, men ein lærur mangt og finnur útav aftaná, hvat ein fekk burturúr, siga teir báðir.

Djóni fór aftur í kongaligu klæðini eftir jól, hóast jóladøgurðin og dagarnir heima gjørdu tilpassingina eitt vet verri. Hann umhugsar nú, um hann skal halda fram í herinum eftir lokna tænastu og fara undir úrbúgving har, tí har eru góðar sømdur og nógvir møguleikar.



*Rene Eidesgaard í búna*